# TILTØK

**Hoyvíkar kirkja**
er opin fyri almenninginum mánadag, mikudag og fríggjadag klokkan 15 til 17 í juni, juli og august mánað

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Mikukvøldið kl. 19.30 verður fyrilestur við Wolf Schmidt presti í Mariukirkjuni. Evni: "Models of the Church". Fyrilestur verður á enskum. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Leygardag kl. messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 v/Wolf Schmidt, prestur í MariuKirkjuna.
www.katolsk.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími, Jógvan Reynslág Joh 12, 1 – 13
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti, Hugni
Sunnudagur kl. 18 Sang- og vitnimøti
Meinigheitskórið syngur
Øll eru hjartaliga vælkomin!
Ongin sunnudagsskúli 21. juni. Sunnudagsskúlin byrjar aftur eftir summarfrítíðina.

**Samkoman Immanuel**
*Brekkutún 5, Hoyvík*
Mikukvøldið kl. 20 Hjúnarbandskvøld, har vit m.a. fara at hyggja eftir filmunum "Fireproof" Øll hjún eru hjartaliga vælkomin.
Hósmorgun kl. 10 Kvinnuhugni, hesuferð heima hjá Hildur, Tórgarðsgøta 14. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.
Fríggjakvøldið kl. 18 Meksikanskt kvøld fyri børn 8-12 ár. Vit møtast úti hjá Lissi, millum Horna 8, har vit m.a fara at royna meksikanskan mat og sjálvandi eru vit øll ílatin meksikansk klæðir :) Verið hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 11 Morgundrekka. Klokkan 12; Familjumøti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími v/Tom Skaale. Evni: Sálmur 33
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/Bjartur F. Johannesen. Evni: at fullrenna skeiðið
Leygarmorgun kl. 9 Tórshavn fólkavald kommuna í 100 ár. Vælkomin til opið hús og morgunmat.
Sunnumorgun kl. 18 Møti v/Gunnar Nattestad

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti – Evni: Jesus, lærusveinarnir og vit á ferð – Birgir Andreassen greiðir frá um Rumeniatúr
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti – Seinasta áðrenn summari, men byrja aftur leygarkvøldi 4. juli – Um viðrar verður útimøti
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Kl. 18 Evangeliskt møti – Evni: Jesus, lærusveinarnir og vit á ferð
Mánadag kl. 12.30 Andakt
www.ebenezer.fo

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Hóskvøldið møti kl. 20
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/Sigurd Sørensen

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími Matt. 20. kap.
Sunnudagin um viðrar fer Sunnudagsskúlin útferð kl. 14. Kl. 18 møti v/Elin Jacobsen og Niels Johannes Tjaldrastein. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsinum í Hvalba**
Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við Magnus Hansen og Jóannes Mortensen. Porkeris kórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti
Hóskvøldið kl. 19 Juniorringur
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti

**Kollafjarðar Missiónshús**
Fríggjakvøldið verður "Stilla løtan" kl. 21
Leygarkvøldið verður útimøti við Missiónshúsið kl. 19 og Opið hús aftaná.
Sunnudagin verður møti kl. 18 Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Týskvøld kl. 20 Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Hebron í Leirvík**
Mikuvøldið kl. 19.30 Bøn, læra og samfelag. Kristian Hansen: Filippibrævið 4

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake.
Sunnudagin kl. 17, Møti við Símun Jacobsen. Sangur við Sonju I. Jacobsen.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Frelsunarheruin Tórshavn**
*Tórsgøta 19*
Týsdagin kl. 20 Hornvenjing.
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti.
Kl.19 Andakt á sambýlnum í Hoyvík
Hósdagin: kl. 20 Ungdómskvøld
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti. Soldát Bernhard Petersen Talar. Bønarløta kl.17.30. Møti kl. 18 Soldát Sámal Midjord Talar
www.frelsunarherurin.fo

**Evangeliihúsið** *Tróndargøta*
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
www.gospel.fo

**Filadelfia** *Landavegur 22*
Mikudagin kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum.
Leygarkvøldið kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti – Tala, lovsangur, skemt og grill. Øll eru vælkomin
www.filadelfia.fo

**Andaktir 21. juni**
Klaksvíkar sjúkrahús kl. 10. Hanus á Gørðum.
Norðoya røktarheim kl. 14.30. Magnus Brahé Jørgensen.

**KFUM & K í Klaksvík**
Týsdagin kl. 21.30 Bønarløta í hugnastovuni
Mikudagin kl. 19.15 Bønarløtan. Kl. 20 Bíbliutími við Øssur Kjølbro. Evni: 2 sáttmálar – 2 gudar??

**KFUM og KFUK í Havn**
Ongi møtir vegna summarferiu.

**Getsemane** *Stangaskákið 1*
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti. Dávid Mørkøre og Jóel Bringsberg tala.
Leygardagin kl. 10 morgunbøn
Sunnukvøldið kl. 18 møti. Kristian Hansen talar.
Barnamøti er samstudis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Fríkirkjan Oasan**
Fríggjakvøldið kl. 20 ungdómsmøtið.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Wilson Goeda.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøld kl. 20 hugnakvøld fyri ung. Hóskvøld kl. 20 ungdómsmøti. Sunnukvøldið kl. 18 møti v/bønarbólkinum hjá monnunum.

**Lívsins Orð** *Saltangará*
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønarmøti
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti
Øll hjartaliga vælkomin

**Saron** *Vestmanna*
Týsdagin kl. 20 Bønarmøti
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting.
www.saron.fo

**Evangelist møti**
verður í vakhús í Sandavági leygardagin kl. 20. Nógvur sangur og fríður vitnisburður. Øll hjartaliga vælkomin. Danial Jack og fleiri. Kaffi aftaná møti.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnukvøldið kl. 18 møti, Uni Næs, prestur talar og Manskórið í Thabor syngur. Innsavnan verður undir møtinum. Eftir møtið verður drekka og øll eru hjartaliga vælkomin!

**Saron Haldórsvík**
Fríggjadagin kl. 20 húsmøti hjá Henny Vík.
Hjartaliga vælkomin

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Týskvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Eysturoyar gongufelag**
Gongutúrur Selatrað - Oyri (ella umvent) eftir gøtuni um Veðranes verður sunnudagin 21. juni. Vit møtast við Statoil støðina í Skálafirði kl. 14 og fara víðari við bussi.Túrurin er miðal. Tilmelding í seinasta lagi leygardagin kl. 14 til Kristian Martin tlf. 77.51.00 ella Óla 25.42.72.

**Dópur**
Í samband við at dóttur Ingu Mariu Mikkelsen og Rene Bøhl Nielsen verður doypt í Fríðrikskirkjuni sunnudagin 21. juni, bjóða tey familju og vinum at vera vælkomin í kirkjukjallaran eftir gudstænastuna.

**Konsert**
Konsert við Helsinki Strings strúkiorkestri hin 18. juni 09: Christianskirkjan kl. 11, Skúlakonsert.
Christianskirkjan kl. 20, Strúkikonser

**Pensionistafelagið í Havn**
Limirnir koma saman í losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst.
Telefon: 22 27 33
E-mail: finnurj@post.olivant.fo

**Eldrafelagið Nón**
Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið á Toftum**
Dagtilhaldið fer nú í summarfríð. Ætlanin er at byrja aftur 1. september.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Tilhaldið í Tórsgøtu, tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til fríggjadag kl. 09.00 – 17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 9-17 Opið hús.
Kl. 10 Vit hittast á Tórsbreyt, Grethe Ellingsgaard
Kl. 14 Kortspæl og onnur spøl.
*Í samband við at Tórshavnar kommuna er 100 ár og at 2009 er rørsluár, fer Tilhaldið at flyta nøkur av innan- og uttandura rørslutiltøkini í Tilhaldinum niðan á Tórsbreyt 17. juni kl. 15-17. Byrja verður við fyrilestri 16. juni týsdagin í Tilhaldinum.*
Týsdagur kl. 10 Vit syngja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin. Kl. 15 Hvønn týdning hava rørsla og dagsljós fyri okkum menniskju. Pál Weihe, yvirlækni
Mikudagur
Kl. 9 Bindiklubbur.
Tórshavnar kommuna 100 ár. Rørsludagur á Tórsbreyt.
Frásøgufólk: Dánjal Húsgarð
**Skrá:**
Kl. 15 Setan: Heðin Mortensen
Felagssangur: Á leikvøllum.
Mikkjal D. á Ryggi
Upphiting: Dánjal Húsgarð, Grethe Ellingsgaard, fimleikalærarar, Randi Petersen, Elisabeth Andreasen, fysioterapeutar. Gómagott frá MBM
Kl. 16 Føroysk dansispøl: Petur, Katrin Dahl og onnur skipa. Felagssangur: Einki er sum.. Chr. Matras. Simme Jacobsen spælir undir. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Hósdagur kl. 10-17 Opið hús
Fríggjadagur
kl. 9 Bindiklubbur.
Kl. 9-17 Opið hús
*Øll eru hjartaliga vælkomin. Opið hús. Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Tilhaldið Hugnin**
Tilhaldið Hugnin hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin Sangur, Terji Dalsgaard spælir.
Mikudagin Vit fara í Slavandsdalin. Farið verður úr Tilhaldinum við bussi kl. 14 stundisliga. Tey, ið orka og hava hug, ganga frá ánni niðan til húsið. Eisini er møguleiki at koyra heilt til húsið við bussinum. Kostnaður 80 kr. Neyðugt er at tekna seg til túrin í Tilhaldinum ella á tlf. 211921 í seinasta lagi *týsdagin 16. juni.*

# HEILSANIR



**Góða systur og svágur**
Hjartaliga tillukku við silvurbrydleypsdegnum. Gleða okkum til leygardagin. Harrans signing í framtíðini
**Heilsan systrarnar og beiggjarnar við makum**



**Zoe og Richard**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini. Jesus pápi fylgi tykkum.
**Ynskja omma og abbi**

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av útnyrðingi. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, seinnapartin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1022 hPa. yvir Føroyum fer í landsynning og mennist. Eitt lágtrýst, 994 hPa. í landsynning úr Hvarvinum stendur mestum í stað.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið vestan fyri Føroyar fer um Føroyar mikudagin.